# Fróðskaparsetur Føroya

## bjóðar í heyst skeið í føroyskum

Tú lærir at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi

Lærari: Lena Reinert

Tíðarskeið: 31. aug. - 18. nov. 2009 mánadag og mikudag, kl. 09.00 - 11.30 leygardagin 3. oktober kl. 09.00 - 14.30

Próvtøka: 23. og 25. november 2009

Fortreytir: Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt á miðnámsskúlastigi ella samsvarandi

Tilmelding: Tilmeldingarskjal finnur tú á www.setur.fo

Tilmeldingarfreist: 17. august 2009

Skeiðsgjald: kr. 4.000,00

Næmingatalið er avmarkað. Gjaldast skal í seinasta lagi við skeiðsbyrjan

Skeiðs- og próvtøkugjald:
konto 9870 428.097.1
í Suðuroyar Sparikassa
viðm. navn og skeið

Skeiðsstaður: Fróðskaparsetur Føroya
Jónas Broncks gøtu 25, 4. hædd
100 Tórshavn

Tlf. 352500 ella setur@setur.fo
Upplýsing um skeiðið: Setursskrivstovan

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum



Mynd: sxc.hu/profile/chrissi & sxc.hu/profile/demordian

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo



# Kundaráðgevi

til Suðuroyar Sparikassa

**Vilt tú vera við til at seta kundan í fokus? Vilt tú gerast ein týðandi leikari á einum nýskapandi liði?**

Suðuroyar Sparikassi søkir eftir kundaráðgeva til deildina í Vági.

**Høvuðsuppgávur**
Ráðgeving av privatkundum og smærri vinnukundum. Harumframt fært tú ein týðandi leiklut í framhaldandi menningini av Suðuroyar Sparikassa.

**Førleikakrøv**
Peningastovnsútbúgving við hóskandi eftirútbúgving, samsvarandi útbúgving ella hægri útbúgving.

Vit vænta, at tú ert positiv/ur, ágrýtin og fyrikomandi. Tær dámar eisini fjølbroyttar uppgávur.

Hevur tú hug at frætta meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við John Henrik Holm, deildarstjóra, á tel. 359885, fartel. 219064, john@sparsu.fo, ella støkk inn á gólvið í deildini í Vági

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Suðuroyar Sparikassa, Postboks 2, 910 Vágur.
Móttakari: John Henrik Holm, deildarstjóri.

**Umsóknarfreistin er 17. august 2009.**

Vitja eisini heimasíðu okkara www.sparsu.fo

Liðið hjá Suðuroyar Sparikassa er mannað við 19 fólkum. Vit arbeiða saman fyri at veita kundum okkara eina munadygga tænastu og fyri at tryggja framtíðina hjá Suðuroyar Sparikassa. Vit seta kundan í fokus og leggja áherðslu á nýskapan, førleikamenning og hugna fyri okkara kundar.

SUÐUROYAR SPARIKASSI
Postboks 2 · 910 Vágur · Fax nr. 359871 · www.sparsu.fo · sparsu@sparsu.fo

# Ferðavinnusamstarv millum Grønland, Ísland og Føroyar

Øll, ið hava áhuga fyri at fremja ferðavinnusamstarv londini millum, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir, vørumenning, ferðir og tílíkt. Umsóknir skulu í minsta lagi fevna um samstarv millum tvey av hesum trimum londunum.

Stuðul verður í høvuðsheitum veittur til verkætlanir innan hesi øki:

**Menning av ‘kombinationsturisme’**
cruise, temaferðir, short break og tílíkt

**Útbúgving innan ferðavinnu**
uppihald til starvsvenjing, fakligar kanningarferðir, skúlaferðir, ferðavinnuútbúgvingar og tílíkt

**Marknaðarføring og greining av ferðavinnu**
víðkan av altjóða átøkum

Umsóknin skal skrivast á umsóknarblað, har møguliga nærri frágreiðing og fíggjarætlan kann leggjast við.

Umsóknarblað kann takast niður á www.mfa.fo ella www.northatlantic-islands.com
Umsóknin skal skrivast á donskum og sendast til:

**NATA**
**C/o Uttanríkisráðið**
Bryggjubakki 12
Postsmoga 118
FO-110 Tórshavn

Møguligir spurningar kunnu setast til:
Per Hansen á tel. 306133 ella teldupost: perh@mfa.fo

**Evstamark fyri at senda inn umsóknir er hósdagin 20. august 2009.**
Næsta freist at søkja er medio februar 2010.

NATA er ein avtala millum ferðavinnumálar áðharrarnir í Íslandi, Grønlandi og Føroyar. Endamálið er at menna samstarvið gjøgnum tiltøk innan ferðavinnu í Vestnorden við at styrkja, samskipa og tryggja eitt framrættað samstarv innan tey øki, har felags ferðavinnulig áhugamál eru. Nevdin í NATA hevur um hendi at umsita og deila út pengar til verkætlanarnir.

NATA
North Atlantic Tourism Association



# Kundarøktari til Vodafone

**Vegna økt virksemi, søkja vit eftir einum dugnaligum, ágrýtnum, jaligum, ábyrdarfullum, fleksiblum og vaksnum fólki**

Ert tú kundavinarlig/ur, hevur tú góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, eins væl og í bólkum, ert tú TANN vit sóknast eftir.

**Arbeiðið umfatar:**
– Kundatænastu
– Hjálp og vegleiðing av kundum
– Søla til privatkundar
– Søla og aktivering av talitíðar kortum
– Fyrifallandi skrivstovu arbeiði

Vit vænta at tú hevur royndir innan kundatænastu, hevur lætt við, og áhuga í at læra nakað nýtt alla tíðina.

Talan er um fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum.

Lønin verður ásett eftir førleika og royndum. Starvið verður at seta hálvan sep.
Spurningar um starvið kunnu setast til Karis 202020/502092

Umsóknir við CV, skulu sendast sum teldupostur til Karis innan 1. september á khj@vodafone.fo

vodafone

IKON // TEL 320 870

Vodafone FO veitir eitt breitt úrval at tænastum innan telesamskifti til stakkundar, vinnu og feløg fyri kappingarførar prísir. Vodafone FO hevur ment eina sterka fjarskiftisskipan í Føroyum og hevur í løtuni 35 fólk í starvi. Vodafone FO samstarvar við Vodafone Group, heimsins leiðandi altjóða samskipan innan fartelefonsamskifti, og er ført fyri at veita tænastur um allan heim. Vodafone FO er dótturfelag hjá Vodafone Iceland. Vodafone FO hevði ein umsetning í 2008 upp á DKK 100 mió.